## Sony / Mitsubishi



Í Japan hava verksmiðjurnar Sony og Mitsubishi gjørt avtalu um elektroniska tøkni í framtíðar bilum, har t.d. fer at bera til at kortleggja eina rutu á heimatelduni, sum síðan við einum memorykorti verður sett í navigatiónsskipanina í bilinum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## 307 í Argentina



Komandi ár byrjar framleiðslan av Peugeot 307 í Buenos Aires í Argentina. Verksmiðjan framleiddi í fjør 17.800 bilar av modellumum Peugeot 206, Peugeot Partner og Citroën Berlingo. Ætlanin er at framleiða 16.000 Peugeot 307 árliga.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mercedes E



Mercedes E bleiv kosin av týska bilblaðnum Auto Bild sum besti bilur í Evropa. Mazda6 kom sum klárt nummar tvey. Blaðið hevur 35 milliónir lesarar í Evropa.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Lancia Ypsilon – ein luksus minibilur

**Italsku Lancia hava ongantíð "dominerað" í gøtumyndini í Føroyum. Teir Lancia sum hava verið her kunnu teljast á einari hond. Lancia Ypsilon er ein luksus minibilur, har kundin sjálvur kann velja litsamansetingina av bilinum uttan og innan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Lancia verða gjørdir í fleiri ymiskum modellum. Tann minsti er Ypsilon, síðan koma Lybra, Thesis og Phedra. Phedra verða gjørdir í Fraklandi, á somu verksmiðju sum Peugeot 807, Citroën C8 og Fiat Ulysse. Lancia Ypsilon verður roknaður sum ein luksus minibilur. Kundin velur sjálvur litsamansetingina av bilinum uttan og innan. Framman líkist bilurin tí størra Lancia Thesis. Ypsilon fæst t.d. við Bose hifi-tónleikaanlegg, framkomnum automatiskum klimaanleggi, sum einans finnast í størri bilum. Umframt bensinmotorarnar fæst bilurin eisini við einum nýggjum 1,3 litur Multijet-dieselmotori við 70 hk saman við einum nýggjum Dualmode-girkassa við automatiskum girskifti. Lancia bilarnir verða ikki marknaðarførdir í Danmark og Føroyum.



*Lancia Ypsilon er ein luksus minibliur við framkomnari útgerð, sum einans finst í størri bilum*



*Kundin velur sjálvur litsamansetingina innan og uttan. Setrini eru líka fín sum í størri luksusbilum*

# Mazda3 - sýndur fram í Genéve

**Fyrst bleiv avloysarin fyri Mazda 626 til Mazda6, avloysarin fyri Mazda Demio bleiv til Mazda2. Á bilafrámsýningini í Genéve var ein Mazda MX Sportif, ið eftir ætlan kemur at avloysa Mazda 323. Navnið verður Mazda3**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað gongur hart fyri seg hjá Mazda í hesum døgum, tá nýggj modell koma á marknaðin næstan hvørt ár. Fyrst kom Mazda6, Mazda2 og RX8 eru á veg, samstundis sum tað ikki verður leingi, til ein avloysari fyri Mazda 323 kemur á marknaðin. Konceptbilurin Mazda MX Sportif, ið bleiv sýndur fram á bilafrámsýningini Genéve, verður eftir ætlan avloysari fyri Mazda 323 við navninum Mazda3. Talan er um ein bil sum verður bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Ford Focus.

Mazda hava heilt broytt stíl, nú leggja teir seg eftir at gera familjubilar við sportligum designi og koyrieginleikum. Enn hava vit ikki nógvar upplýsingar um nýggja Mazda3, men hann kemur at fáast við einum framkomnum 2,0 litur motori, sum lýkur tey strongu japansku ULEV-umhvørviskrøvini (Ultra Low Emission Vehicle).



*Mazda MX Sportif, seinni Mazda3, minnir nógv um Mazda6 framman. Bilurin verður bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Ford Focus.*



*Smartur bilur og elegant design. Baklyktirnar eru í sama stíli sum á Mazda6*

ítróttur

Nr. 65 • hósdagur • 3. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Neistin FM-vinnari í Kvinnuunglingum



*Nøvn aftast frá vinstru: Sólvá Dam, Barbara á Rógvi, Gunnvá Brockie, Angela Mørk, Fríða Berg og Birita H. Christiansen.Fremst frá vinstru: Rakul Augustinussen, Lív Sørensen, Herfríð Hammer (við dóttrini Joan), Selma Dahl Erol og Anna Clementsen*

Kvinnuunglingarnir hjá Neistanum eru Føroyameistarar fyri kappingarárið 2002/03. Nýkosnu FM-vinnararnir hava bert sett eitt stig til í landskappingini í ár, so ikki kann sigast annað, at FM-heitið er fult uppiborð. Sosialurin ynskir kvinnuunglingunum hjá Neistanum hjartaliga tillukku við FM-heitinum.

**-páll**

# Bátastevna í Vestmanna

TÍÐINDASKRIV
*frá VÍF*

Aftur í ár skipar VÍF fyri bátastevnun í Vestmanna. Bátastevnan verður leygardagin 24 maj og verður hon skipað á sama hátt sum í fjørð, har bátar úr øllum landinum seta stevnu í Vestmanna, til felags hugna og har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum. Allir luttakarar, bæði av og í bygd, verða bodnir til ábit á Føroya Fiskavirking, har stór kantina verður fyriskipað.

Undirtøka í fjørð var so mikið stór, at tað tiverri ikki var møguligt at bjóða luttakandi manningunum úr Vestmanna til ábit eisini, men hetta verður so gjørt í ár og er endamálið at samansjóða bæði bygda- og avbygdafólk hendan dagin.

Ætlanin er eisini at fyriskipað øðrum tiltøkum, so onnur eisini leita sær til Vestmanna, at hugna sær saman við bátsmanningunum, hendan dagi.

Um kvøldið verður stórur country dansi í Ítróttarhøllini, har Country Bólkurin úr Klaksvík spælir til dans.

Bátastevnan, sum verður eitt árligt afturvendandi tiltak í Vestmanna, verður fyriskipað av VÍF og inntøkurnar av tiltakinum verða brúktar til at fíggja nýggja kapproðrarneystið hjá felagnum og til rakstur og nýbyggjan av kapproðrarbáum. VÍF er í ferð við at byggja nýggja Havfrúgv og er tað Ólaf Haldansen í Vestmanna, ið er byrjaður at smíða bátin, ið verður klárur til kappingarárið 2003.

Olaf Haldansen hevur frammanundan smíða felagnum 2 kapproðrabátar - Vestmenning og Fortunu. Hesir bátar hava klára seg væl í kappingunum seinastu árini. Vestmenningur hevur verið eitt av bestu 10-mannaførunum og vunnið nógvar sigrar. Fortuna, ið varð lánt til Vágs í fjørð, vann føroyameistaraheiti sannførandi undir navninum Smyril, so vestmenningar eru spentir uppá nýggju Havfrúnna frá Olafi.

